## Jólamatiné í Dómkirkjuni

Tórshavnar Manskór fer saman við øðrum at hava eina fyrrapartskonsert í Havnar Kirkju leygardagin 20. desember kl. 11.30. Seinastu fimm árini hevur Konsertfelagið saman við Dómkirkjuni skipa fyri einari jólamatiné. Tey, sum spæla og syngja hava í rættuliga stóran mun veri tey somu øll árini. Fyrst og fremst er tað Tórshavnar Manskór sum myndar skránna. Teir fara at syngja góðar, kendar jólasangir. Okkurt nýtt verður eisini at hoyra. Við urguna situr dómorganisturin Gudmund Mortensen, sum fyriuttan præ- og postludium spælir eitt stykki av barokktónaskaldinum Buxtehude. Berghild Poulsen fer, sum undanfarnu árini, eisini at syngja á hesari konsertini. Eitt av okkara ungu violintalentum, 17 ára gamla Maria Heinesen, sum er næmingur hjá Nikolas Kapnas í Tórshavnar Musikkskúla, fer at spæla ein sonatusats av Mozart saman við Árna Hansen á klaveri.



# Løgtingið samtykt ómøguliga sparing

**Løgtingslimir vistu ikki, hvat teir gjørdu, tá teir samtyktu at broyta stuðulin til heilivág til pensjónistar, tí sparingin er ómøgulig at seta í verk við so stuttari freist, sum Løgtingið vil**




*Pensjónistar missa nú ein part av stuðlinum til, men Landsapotekarin sigur, at hetta er samtykt í óðum verkum uttan at spyrja nakran eftir, og tað verður ómøgiligt at broyta skipanina við so stuttari ávaring*

TILSKOT
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Tað verður ómøguligt at seta eina so stóra broyting í verk upp á so stutta tíð.

Heri Mørkøre, landsapotekari, er ikki fegin um framferðina hjá Løgtinginum, tá ið tað varð samtykt at broyta stuðulin til heilivág til pensjónistar.

- Tá ið uppskotið varð samtykt, varð ført fram, at hetta ongar avleiðingar fær. Men tað er ikki rætt, tí tað fer at fáa heilt stórar avleiðingar fyri apoteksverkið, sigur Heri Mørkøre.

Hann sigur, at telduskipanin, sum apotekið hevur í hesum sambandi, er ómetaliga fjøltáttað og fløkt og tað er ómøguligt at broyta hana til fyrsta januar.

- Hetta er ein ómetaliga fløkt telduskipan. Men ein fløkt telduskipan er eisini fløkt at broyta, so hetta verður tórført.

Hann leggur dent á, at uppgávan skal nokk loysast.

- Tað ber bara ikki til at loysa hana í eini handavending.

Hvussu nógv tað fer at kosta at broyta skipanina, dugir hann ikki at meta um.

Men Løgtingið hevur sett sær fyri at spara góðar 600.000 krónur við teimum broytingum, sum eru gjørdar og keldur í politikki meta, at tá ið skipanin hjá apotekinum er broytt til nýggju reglarnar, er lítið eftir av sparingum. Kanska fer tað enntá at kosta meiri at broyta skipanina, enn sparingarnar fara at gera.

Einastu tøl, sum eru nevnd í uppskotinum eru frá 2004.

Landsapotekarin sigur, at ongin hevur spurt seg og tí hevur hann ikki kannað málið, men hann sigur, at apoteksverkið hevur nýggjari hagtøl enn tað.

### Missa stuðul

Pensjónistar fáa tilskot til resept-heilivág. Men í kunngerðini stendur, at umframt heilivág, kann annað setast á reseptina, sum skal brúkast í eini sjúkuviðgerð.

Eitt dømi kann vera um ein pensjónist, sum hevur eitt sár, sum ikki vil lekjast og at læknin tískil heldur, at tað hevði verið hent við onkrum bloytandi kremi fyri at viðgera sárið.

Talan kann eisini vera um ein pensjónist, sum fær kálktablettir, tí honum manglar kálk.

Hvørki bloytandi krem ella kálktablettir eru heilivágur, men verða tey brúkt í eini sjúkuviðgerð, kann tað skrivast á eina resept og so gevur tað rætt til tilskot.

Heri Mørkøre sigur, at sjálvandi hevur tað stóran týdning, at læknin ger sær greitt, at tað, sum stendur á reseptini, skal brúkast til at viðgera eina sjúku. Fer hann út um tað, livir hann ikki upp til álitið, myndugleikarnir eiga at hava á honum.

- Men læknin kann sjálvandi eisini koma til ta niðurstøðu, at ein sjúklingur hevur brúk fyri vitaminum og so kann við fullum rætti skrivað tað á reseptina.

Landsapotekarin sigur, at nú hevur Løgtingið broytt lógina soleiðis at pensjónisturin bara fær stuðul til heilivág, sum sjúkrakassin gevur tilskot til.

- Tað kann bara vera handkeypsheilivágur og reseptheilivágur. Restina skal pensjónisturin sjálvur betala allan, sum hann er, eisini tað, sum læknin higartil heldur er neyðugt at sjúklingurin fær.

Umframt vitaminur, kálktablettir og annað slíkt, kann talan eisini vera um svøvntablettir, nakrar nervatablettir og so víðari.

### Spurdu ongan

- Hetta er ein so ómetaliga fjøltáttaður trupulleiki, at tað er ikki nakað, sum metast kann um í eini handavending, sigur Heri Mørkøre.

Og tað, sum ørkymlar hann allarmest, er, at málið verður samtykt, uttan at tað hevur verið til hoyringar nakrastaðni.

- Hevði málið verið til hoyringar, kundi løgtingslimir fingið eina frágreiðing um, hvussu hetta hongur saman.

Hann sigur, at við hesum hevur hann ikki tikið støðu til, hvat er rætt og rímiligt.

- Men tað er burturvið at broyta eina skipan í eini handavending, sum hevur verið so leingi

Tað rætta hevði sjálvandi verið at givið sær stundir at viðgjørt málið, so at løgtingslimir vóru greiðir yvir, hvørjar avleiðingar hetta fær.

Landsstýriskvinnan í almannamálum hevur ført fram, at grundin til at tað er neyðugt at broyta lógina, er, at landsgrannskoðarin hevur lyft fremstafingur og metir ikki, at lógin verður umsitin heilt eftir bókini, tí tað veldst alt um, hvussu lagaligur læknin er at seta vitaminur og annað upp á reseptirnar

Landsapotekarin hevur alla virðing fyri, at Løgtingið tekur viðmerkingar frá Landsgrannskoðaranum til eftirtektar

Men í hesum føri heldur hann, at í fyrstu syftu hevði rætta mannagongdin verið at broytt lógina, so at ongin ivi er um, at tað, sum fer fram, er lógligt.

- Er áhugi so fyri at endurskoðað stuðulin, hevði tað rætta verið at sett seg niður og viðgjørt broytingarnar í friði og náðum og gjørt neyðugu metingarnar um avleið-

## Ikki førir fyri at viðgera málið

**Andstøðan mótmælti harðliga, at stuðul til pensjónistar verður minkaður, uttan at spyrja nakran eftir**

Tað líkist ongum, at stuðul til heilivág til pensjónistar verður minkaður, uttan at spyrja nakran eftir.

Tað heldur andstøðan í Løgtinginum.

Ætlanin er endaliga samtykt, men andstøðan heldur, at tað er skrumbla ígjøgnum uttan at geva sær greitt, hvørjar avleiðingar tað fær.

Sum tað sæst í hinari greinini í blaðnum. Er landsapotekarin ikki ósamdir.

Tað vartrivnaðarnevndin hjá Løgtinginum, sum viðgjørdi málið, men andstøðan førir fram, at tað var bara upp á kvamsvís, tí tey sluppu ikki at kalla nakran, sum hevur við málið at gera, til hoyringar í nevndini.

Tí sigur andstøðan í vinnunevndini, Karsten Hansen, Tórbjørn Jacobsen og Bergtóra Høgnadóttir Joensen, at tey vóru ikki før fyri at koma við einum áliti, tí tey høvdu ongan møguleika at viðgera tað.

Meirilutin, Jákup Mikkelsen, Andrias Petersen, Jaspur Vang og Helgi Abrahamsen tóku undir við uppskotinum.